Hósdagin kl. 17.00 letur sjósavnið í Stóra Pakkhúsi í Vági upp fyri almenninginum. Sjósavnið er partur av Vágs Sóknar Bygdasavni

Sjósavnið í Vági letur upp í dag

Arbeitt verður av øllum alvi við at fáa sjósavnið á seglloftinum í Stóra Pakkhúsi í Vági liðugt uppsett, so klárt er til jóansøkuna. Og hósdagin klokkan 17 fara dyrnar upp og skoðast kann aftur í tíðina til sjólív og gerandislív

SJÓSAVN

Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Stóra Pakkhús er fjøltáttað hús, ið hýsir alskins feløgum og tiltøkum. Ein partur av virkseminum er eitt sjósavn, sum arbeitt hevur verið við og nú verður dúgliga arbeitt á seglloftinum, so klárt er til jóansøku. Fyrireikararnir siga í tíðindaskrivi, at nú er um at vera klárt.

Hósdagin kl. 17.00 letur sjósavnið í Stóra Pakkhúsi í Vági upp fyri almenninginum. Sjósavnið er partur av Vágs Sóknar Bygdasavni. Í longri tíð hevur verið arbeitt við at seta upp sjósavnið, og nú er komið á mál.

Sjósavnið er á sokallaða Seglloftinum, har seglini hjá Garðamonnum (A/S J. Dahl á Gørðunum í Vági) vórðu seymað. Á Seglloftinum, har m.a. Kristin á Økrum og Julius við Kikslið seymaðu segl, eigur mangur vágbingur fótaspor. Hesin parturin av Stóra Pakkhúsi ein søga fyri seg sjálvan. Á veggjunum hava fólk síðan fyrst í 1920unum skrivað navn sítt og árstal. Seglloftið var eitt sera væl umtókt savningarstað fyri dreingjaungdómar í Vági, og funnu hesir hvør í sínum lag upp á at skriva navn sítt við kriti á veggirnar og gjørdust sostatt ótilvitað týdningarmikil partur av bygdarsøgu okkara.

Fyrsta framsýningin í sjósavninum fevnir um fiskivinnu á sjógvi og landi í Vági í tíðarskeiðinum frá mitt í 1800talinum fram til seinna heimsbardaga. Hetta tíðarskeið var merkt av, at Vágur var fyri stórum vøkstri og millum fremstu vinnupláss í landinum. Søgan frá hesum tíðarskeiði í Vági er rík, og sýnir Sjósavnið í Stóra Pakkhúsi fram ein brotpart av hesum í framsýningini, sum letur upp tórsdagin, verður m.a. sagt í tíðindaskrivi.

Framsýningin er skipað soleiðis, at vitjandi skulu fáa eina heildaruppliving fevnandi um lutir, myndir og frásagnir, umframt møguleikan at síggja ein film frá 1927 og hoyra eina øðrvísi ljóðmynd, sum helst ikki finst á nøkrum øðrum savni í landinum.

Gluggaglæma og sjalskapping

Aftur í ár verður søluframsýningin Gluggaglæma á skránni í Müllers pakkhúsi, har eisini úrslitið av sjalskappingini, sum varð útskrivað í januar, verður avdúkað

LIST

Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Gallerí Gluggaglæma er tann einasta føroyska heimasíðan av sínum slagi

Í september í ár verður søluframsýningin Gluggaglæma við livandi verkstøðum aftur í Müllers pakkhúsi, har øll áhugað kunnu luttaka.

Talan er um eina framsýning, sum verður í átta dagar við skiftandi framsýnarum. Fyrireikararnir, Jónhild Johannesen og Randi Vang, siga, at miðað verður eftir at skapa eina framsýning, ið fevnir um tað gamla siðbundna eins og tað nýggjasta innan føroyskt snið, handverk og handverkslist.

Gluggaglæma er tó ikki bara livandi verkstøð einaferð um árið. Hendan søluframsýningin finst eisini sum tann einasta í Føroyum á internetinum. Á www.craft.fo finst ein spennandi heimasíða, sum er eitt gallerí, sum eisini er eitt sølutorg fyri handverk og sniðgeving á internetinum. Gallaríið er óheft av sjálvari søluframsýningini og bjóðar pláss fyri øllum hand- og listhandverksfólkum, ið ynskja at gera sítt handverk sjónligt fyri almenninginum við sølu fyri eygað.

Áhugin fyri luttøku í sjalskappingini tykist at vera stórur, og eru fyrireikararnir sera spentar at síggja úrslitini. Øll sjalini verða nevniliga at síggja á dagligu mótasýningunum allar dagarnar, meðan søluframsýningin er opin.

Endamálið er at eggja til nýskapan við íblástri úr gomlum, føroyskum sniðum. Tríggir dómarar koma at kjósa tað besta uppskotið, og verður dømt út frá nýskapan við íblástri úr gomlum føroyskum sniðum, nýtsluháttin av føroyska tilfarinum, hegni og handverksdygd. Tríggjar virðislønir verða latnar, og verða vinnararnir avdúkaðir á tí seinasta degnum í søluframsýningini í Müllers pakkhúsi.

Seinasta freist at lata sjal inn til Randi er tann 15. august.

Gluggaglæma hevur tvey byggistig, um ein kann kalla tað so. Fyrsta stigið er framt við, at heimasíðan er komin. Á hesi heimasíðuni ber til at síggja privatar lýsarasíður við vørumyndum og persónsupplýsingum. Tað vil siga, at um onkur vil hevur hug at fáa síni verk meiri sjónlig, so ber tað til umvegis internetið. Alt hetta er ókeypis í eini fyribils royndartíð.

– Kostnaðurin er tó ikki endaliga settur enn, sigur Jónhild.

Annað stigið er ein útbygging av skipanini til tess at rúma vørufrágreiðing, prísir og annað bæði á føroyskum og enskum. Ella eitt slag av privatum heimasíðum undir Gallarí Gluggaglæma.

Jónhild Johannesen og Randi Vang vænta, at tað arbeiðið fer í gongd aftaná royndartíðina seinni í ár.

Jónhild Johannesen og Randi Vang skipa fyri søluframsýningini Gluggaglæma

Hugskotið við Gallerí Gluggaglæma á internetinum er sprottið úr søluframsýningini Gluggaglæmu september 2003. Hendan søluframsýningin er stuðlað av Vinnuframagrunninum.

Seinasta freist at boða frá luttøku til søluframsýningina í Müllers pakkhúsi er tann 1. juli. Tilmeldingarblað fæst á heimasíðuni www.craft.fo. Eru spurningar kunnu teir setast til Randi Vang á tlf 514265 ella umvegis teldupost ransiva@post.olivant.fo

Várkonfirmantarnir í Suðurstreymi:

Ganga til eftir summarfrítíðina

Eftir summarfrítíðina 2004 verða várkonfirmantarnir í Suðurstreymi undirvístir um heystið, og heystkonfirmantarnir um várið

KONFIRMATIÓN

Tíðindaskriv

Higartil hava konfirmantarnir í Suðurstreymi gingið at lisið nakrar vikur í skúlatíðini sama hálvár, teir vórðu konfirmeraðir, men soleiðis er ikki longur.

Á fundi 12. januar í ár millum prestar og skúlaleiðarar í Suðurstreymi varð avgjørt at fara undir eina nýggju lesiskipan, har hvør konfirmantflokkur fær undirvísing tveir skemalagdar tímar um vikuna í eitt hálvár.

Várkonfirmantarnir 2005 møta eftir hesi nýggju skipan fyrstu ferð týsmorgunin 24. august 2004 kl. 8.00 - 9.30 og soleiðis hvønn týsmorgun til og við desember. Konfirmantar í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi møta í Havnar kirkju, og teir í vestara prestagjaldi í Vesturkirkjuni. Markið millum eystur- og vesturbýin er Tróndargøta, Varðagøta og Villingardalsvegur. Havið dóps- ella navnabrævi við.

Heystkonfirmantarnir 2005 ganga til prest eftir hesi somu ætlan hvønn týsmorgun somu tíð frá januar 2005 til juni. Nærri verður lýst, nær hesir konfirmantar skulu møta.

Prestarnir í Suðurstreymi eru:
Bjarni Bæk
Sonja Klein
Sverri Steinhólm
Jóannis Fonsdal
Heri Joensen
Bergur D. Joensen

90 ára gamla ferðamannaskipið, »Doulos«, ið nú er trúboðaraskip, hevur heimsins størstu flótandi bókasølu

Doulos kemur á Havnina í kvøld

Í kvøld, hóskvøldið kl 18, verður stórsligin møttøka við Saltsølu-na á Vestaru bryggju í Havn, tá ið heimsins elsta ferðamannaskip, trúboðanarskipið Doulos kemur, við føroyinginum Árna Jensen á brúnni

SKIPAVITJAN

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Í kvøld kl 18 leggur havnarmaðurin, Árni Jensen, skipari, heimsins elsta ferðamannaskip, trúboðaraskipið Doulos at bryggju við Saltsøluna á Vestaru Bryggju í Havn

Sjálv móttøkan verður, tá ið skipið hevur lagt til bryggju. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, varaløgmaður, og Osmundur Justinussen fara at bera fram vælkomstheilsanir. Songkórið í Ebenezer fer at syngja, hornorkostrið úr Frelsunarherinum fer at spæla, sína vøkru tónar, ið fara at runga, út frá Vestaru bryggju, fyri 40 ymiskum tungumálum.

Beint aftan á verður stutt móttøka fyri løgtingslimum og landstýrismonnum, har Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, letur upp heimsins størstu flótandi bókasølu, fyri almenninginum.

Við skipinum eru umleið 300 fólk frá fleiri enn 40 tjóðum, harav ein annar føroyingur, klaksvíksgentan Margith Olsen, ið hevur verið umborð nærum eitt ár.

Nakrir føroyskir gestir eru eisini umborð, onkur fyri at hjápa til at sigla skipið heim, onnur ið eru uttanlands, koma heim við skipinum at ferðast.

Doulos, ið bert er tvey ár yngri enn kenda ferðamannaskipið Titanic, er bygt í 1914 og er sostatt elsta siglandi ferðamannaskip í heiminum.

Nógv tiltøk eru á skránni. Fyrireikararnir siga, at samkomur, ið ynskja at fá vitjan, kunnu siga frá á tlf. 585841 ella 585840, um tær ynskja tað.

Skipið er opið allan dagin fyri almenninginum, heimsins størsta flótandi bókasøla er opin allar dagar frá 10 - 22. Kaffistova er umborð í hugnaligum umhvørvi.

Nógv tiltøk verða umborð, t. d. kvinnumøti, møti fyri menn og fyri fyrrverandi Om'arar, og tiltøk fyri børn - eisini saman við familjuni.

Eitt av tiltøkunum í landi er Ítróttarhøllini á Hálsi, har verður tiltak fyri ung.

Skipað verur fyri ymiskum í landi fyri manningina, gongutúrar í náttúruni ella bil túrar, túrar í opnum bátið o. m. a.

Mikukvøldið 30. juni verður farið til Klaksvíkar, har eisini verður skipað fyri móttøku.

Nógv áhugaverd tiltøk verða eisini har, sum verða kunngjørd seinni.

Faldari um tiltøkini eru at fáa runt um í landinum ella við at venda sær til oman fyri nevndu telefonnummur.

Miðsummarhald í Klaksvík í morgin

Miðsummarhaldið í Klaksvík, sum Fornminnafelagið og skótaliðini skipa fyri, verður úti í Grøv í annaðkvøld

Miðsummarhaldið, sum hvørt ár síðani 1989 hevur verðið hildið í Klaksvík, verður í morgin, fríggjadagin 25. juni

MIÐSUMMARHALD

Tíðindaskriv

_ Tað má sigast, at tað hevur viðrað stak illa at kunna skipa fyri nøkrum uttandurða í Klaksvík hesar dagarnar um miðsummarleitið, tí vit hava havt alt annað enn summarveður. Í veðurforsagnunum sær tó sær út til at ein glotti verður nú fríggjadagin, og er tí avgjørt at taka henda dagin til hetta tiltak, siga Norðoya Fornminnafelag og Skótaliðiðini í Klaksvík.

Sum vanligt tendra skótarnir eldarnar kl. 15 í Grøvini, har høvi verður hjá børnum og vaksnum at hugna sær til kvøldið kemur.

Klokkan 19 verður miðsummarrøðan, og í ár verður tað Kári Purkhús, studentaskúlalærari, ið kemur at halda røðuna.

Eisini verður sungið úr sangheftinum.

Verður veðrið til tað verður farið ein gongutúr út í náttúruna, har øll eru vælkomin at vera við. Hvar farið verður verður upplýst á fundinum.

Tað eru skótaliðini í Klaksvík og Norðoya Fornminnafelag, sum skipa fyri tiltakinum við stuðli frá Klaksvíkar kommunu, og ynskja tey øllum vælkomnum til miðsummarhaldið í Klaksvík.

»Sporty« letur aftur

Eftir tvey ár í Handilskjarnanum í Havn, gevst Alma á Lava við ítróttarhandlinum Sporty. Orsøkin er, at hon hevur valt at brúka tíðina til annað. Í hesum sambandi verður afturlatingaútsøla, ið byrjar hósmorgunin og heldur fram alla vikuna. Alma á Lava, sum eigur handilin, nýtir høvi at takka øllum viðskiftafólki fyri gott samstarv.